## Sendið ikki Petur av landinum

**Feløgini í Meginfelag teirra brekaðu mótmæla staðliga ætlanini um at senda fimm ára gamla Petur, sum hevur atferðartrupulleikar, av landinum**

YVIRLÝSING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Á aðalfundinum hjá Meginfelag teirra brekaðu leygardagin samtyktu feløgini einmælt at mótmæla, at nógv umrøddi Petur verður sendur av landinum á viðgerðarstovn. Feløgini vísa á, at Petur hevur systkin, ommu og abba og øll síni ættarbond og trygdarnet í Føroyum, meðan hann ongan góðan eigur í Danmark.

Í yvirlýsingini heita feløgini á landsstýrismannin í almannamálum, borgarstjóran í Tórshavnar kommunu og fyrisitingina í barnaforsorgarmálum um at bera so í bandi, at Petur ikki verður sendur av landinum.

– Takið lógvatak saman og gevi honum tað, hann hevur fyri neyðuni her heima. Vit hava fakliga førleikan í Føroyum, siga feløgini í MBF.

Tey ásanna at ávisir løgfrøðiligir og fyrisitingarligir trupulleikar eru, men eftirlýsa menniskjasligu síðuna í viðgerðini av málinum.

Feløgini, ið hava undirskrivað yvirlýsingina eru: Atltzheimerfelagið, Føroya Astma/Allergifelag, LFA, Føroya Blindadelag, Cøliakifelag Føroya, Deyvafelag Føroya, Epileptikarafelag Føroya, Felagið fyri hoyribrekað í Føroyum, Giktafelag Føroya, Heilafelagið, Felagið fyri apopleksi og Afasirakt, høgættarfelagið, Javni, Lymfødemfelagið, Felagið fyro MBD/Damp, Morbus Bechterew, Nýrafelagið, Parkinsonfelagið, Føroya Psoriasisfelagið, Sclerosefelagið og ÍSB.

# Lítli Petur av landinum 7. juni

**Í dag koma umboð fyri danska viðgerðarstovnin til Føroya at heilsa upp á fimm ára gamla Petur, áðrenn hann um tríggjar vikur verður sendur av landinum.**

LÍTLI PETUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Lítli Petur varð dúgliga umrøddur á aðalfundinum hjá MBF leygardagin. Feløgini mótmæla harðliga ætlanini hjá myndugleikanum at senda hann av landinum. Á myndini geva limir føroysku myndugleikunum reyða kortið*

*Mynd: Jan Muller*

– Øll feløgini standa fullkomiliga spyrjandi eftir, hvussu tað ber til, at Petur skal sendast av landinum, sigur Bára Johansen, formaður í MBD/Damp felagnum.

Málið um 5 ára gamla Petur, ið hevur atferðartrupulleikar, varð dúgliga umrøtt á aðalfundinum hjá MBF leygardagin. Sosiala deild fekk harðar ákoyringar frá feløgunum fyri sína viðgerð av málinum.

– Drongurin er ongantíð veruliga kannaður, men kortini vil sosiala deild alt fyri eitt senda hann av landinum. Grundarlagið fyri avgerðini er ómetaliga veikt, og tí royna vit av øllum alvi at broyta avgerðina. Eitt er vist, at drongurin verður ongantíð aftur menniskja, um hann verður sendur av landinum, sigur formaðuin í MBD/Damp felagnum.

### Danir vitja

Bára Johansen greiðir frá, at omma og abbi Petur vóru á fundi við barnaverndina á sosialu deild mikudagin í farnu viku, og fingu at vita, at Petur verður sendur av landinum 7. juni.

Í dag, týsdagin, koma umboð fyri danska viðgerðarstovnin til Føroya at heilsa upp á Petur. Aðrastaðni á síðuni sæst, at feløgini í MBF harðliga mótmæla ætlanini at senda lítla Petur av landinum.

– Yvirlýsingin er seinasti møguleiki at fáa landsstýrismannin at gera okkurt við málið, so Petur sleppur frá at fara av landinum. Hóast vónin ikki er stór, so vóna vit veruliga, at landsstýrismaðurin fær broytt avgerðina, sigur Bára Johansen at enda.

Vit royndu at fáa viðmerking frá landsstýrismanninum í almannamálum, Hans Paula Strøm, men hetta eydnaðist ikki, áðrenn okkara evsta mark.

# Øll ár eru ár teirra brekaðu

**Fráfarandi formaðurin í MBF, Marjun Sigurðsdóttir fegnaðist um undirtøkuna fyri ári teirra brekaðu í fjør. Í formansfrágreiðingini vísti fráfarandi formaðurin á, at árið hevur verið støðið undir eini hugburðsbroyting viðvíkjandi brekaðum í Føroyum**

AÐALFUNDUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Nýggi og fráfarandi formaðurin í MBF, Leila Solmunde og Marjun Sigurðsdóttir*

*Mynd: Jan Muller*

– Grundleggjandi samfelagsbroytingar verða ikki framdar eftir einum ári. Heldur ikki hvørva brek, fyri tí um vit hava eitt »ár teirra brekaðu«. Øll ár eru ár teirra brekaðu.

Fráfarandi formaðurin í Meginfelag teirra brekaðu, Marjun Sigurðsdóttir, vísti í formansfrágreiðingini á, at hóast ár teirra brekaðu var í fjør, heldur áhaldandi stríðið fyri at vinna brekaðum betri rættindi fram.

Á aðalfundinum hjá MBF leygardagin fegnaðist hon um stóru undirtøkuna fyri ári teirra brekaðu.

– Árið 2003 hevur verið støðið undir eini hugburðsbroyting. Fólk, feløg og stovnar hugsa øðrvísi, tá tað ræður um atgongd og javnrætt. Bæði privatir og almennir stovnar gjørdust meira tilvitað um tørvin hjá brekaðum í føroyska samfelagnum, sigur Marjun Sigurðsdóttir.

### Eingin langtíðarætlan

Fráfarandi formaðurin sigur seg kortini framvegis sakna ein langtíðar og skipaðan politikk á økinum.

– Árið í fjør átti at verið støðið undir einum langfreistaðum politikki, men hann er ikki at fáa eyga á. Tað neyðugt hjá politikkarum at seta eina 5-10 ára ætlan út í korti, heldur Marjun Sigurðsdóttir.

### Stór undirtøka

Í samband við ár teirra brekaðu í fjør skipaði MBF fyri eitt ótal av ymiskum tiltøkum. Fólkaskúlarnir kring landið høvdu millum annað eina evnisviku um brekað við góðum úrslitum.

– Vit fingu ómetaliga góðan stuðul úti í skúlunum. Vit fingu gjørt børnini meira tilvitað um tey brekaðu, og samanumtikið eydnaðist evnisvikan ómetaliga væl, greiðir Marjun Sigurðsdóttir frá.

### Heilsa og aldur

Seinastu tvey árini hevur Marjun Sigurðsdóttir røkt formanssessin í MBF. Leygardagin takkaði hon fyri seg.

– Aldur og heilsa gera tað, at eg valdi at siga formanssessin frá mær. Tað inniber kortini ikki, at eg fari at halda meg burtur frá felagnum. Við Leilu Solmunde hevur felagið fingið ein frálíkan formann, sigur fráfarni formaðurin í MBF at enda.

## Felagið má standa saman

**Nýggi formaðurin í MBF, Leila Solmunde, vil leggja nógv fyri, at tey 23 feløgini í meginfelagnum kenna seg væl í felagnum**

NÝGGJUR FORMAÐUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Aðalfundurin hjá MBF valdi leygardagin, Leilu Solmunde, til nýggjan formann í felagnum. Nýggi formaðurin sigur, at fremsta uppgávan hjá sær verður at fáa felagið at standa saman.

– Vit eru 23 feløg í MBF, og tí eru ofta 23 meiningar um ymisk øki. Høvuðsuppgávan hjá mær verður at fáa felagið at tosa við eini rødd. Eg ætli mær eisini at leggja nógv fyri, at feløgini kenna seg væl í MBF, sigur Leila Solmunde.

### Ein styrki

Í 16 ár var Leila Solmunde formaður í Giktafelag Føroya, sum er eitt av feløgunum undir meginfelagnum.

– Tað er óivað ein styrki hjá mær, at eg havi verið formaðurin í einum av feløgunum undir MBF. Eg veit, hvat tey hugsa og vænta av einum formanni, tí eg havi roynt at sitið hinumegin borðið, og hetta átti at komið mær til góðar, vísir Leila Solmunde á.

Nýggi formaðurin greiðir frá, at hjartamálið hjá henni verður framvegis at virka fyri at fólk við skerdum førleika kunna verða á jøvnum føti við hini í føroyska samfelagnum.

### Í koyristóli

Leila situr sjálv í koyristóli, og tað verður starvsnevndin í MBF noydd at tillaga seg til.

– At eg siti í koyristóli verður heilt avgjørt øðrvísi hjá nevndini. Tey verða noydd at ráðleggja øðrvísi, tí eg sleppi ikki fram at allastaðni, sigur Leila Solmunde at enda.



Víðgongdur prestur í Christianskirkjuni:

# Fosturtøkur elva til muslimskan yvirgang

**Fosturtøkur eru hópdráp. Hópdráp skapa fólkatørv, og tí standa dyrnar í vesturheiminum nú uppá víðan vegg fyri muslimum og teirra yvirgangsatsøknum. Hetta staðfesti frákoyrdi norski presturin Ludvig Nessa í Christianskirkjuni sunnukvøldið. Sami prestur er eisini kendur fyri at siga, at tað er ikki verri at skjóta læknar enn at taka fostur úr móðurlívi**

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Tey umleið 300 fólkini, ið høvdu leitað sær á felagsmøti í Christianskirkjuni sunnukvøldið, upplivdu eina ikki sørt øðrvísi gudstænastu. Frákoyrdi Peter O.K.Olofsen bjóðaði vælkomin og gav síðani einum øðrum frákoyrdum presti, norska Ludvig Nessa, orðið.

Tað var felagsskapurin Pro Vita, ið hevði fingið Nessa til Føroyar. Men í staðin fyri at tosa um fosturtøkur út frá einum kristiligum sjónarmiði, sum tey flestu ivaleyst høvdu væntað, nýtti Nessa høvið og prædikustólin til at fordøma Islam.

### Fosturtøkur og muslimskur yvirgangur

– Muslimurin Naser Khader hevur fyri stuttum skýrt ávísar føroyingar at vera av ringastu fundamentalistum. Sjálvur havi eg upplivað tað sama, og hetta er ikki fyrstu ferð í søguni, muslimar hava gjørt tað til sítt kall at fordøma og beina fyri teimum kristnu. Og sjálvmorðsbumburnar, sum nú herja heimin, eru beinleiðis tilstuðlaðar í Koranini.

Soleiðis innleiddi Nessa sína prædiku. Síðani fylgdi eitt søguligt yvirlit yvir muslimska fólkatýning kring heimin, sum fyribils hevur nátt sítt hæddarpunkt við yvirgangatsøknunum hjá Al Quada. Men bert fyribils. Meir og verri er í væntu, og vit hava so at siga sjálvi skyldina. Við at týna heili ættarlið við fosturtøkum, hevur vesturheimurin skapað ein fólkatørv, sum letur dyrnar upp fyri muslimskum óflýggjakroppum. Hesir fáa sostatt eitt frálíkt høvi at lúra okkara siðir og mentan av, fyri síðani at leypa á okkum, tá vit minst vænta tað, segið Nessa.

Steðga vit hingvegin øllum fosturtøkum í stundini, kunnu vit aftur skapa eina javnvág í íbúgvaratalið. Tá hava vit ikki longur brúk fyri útlendskari, serliga muslimskari arbeiðsmegi, og soleiðis kunnu við steðga muslimskum yvirgangsatsøknum í vesturheiminum, var boðskapurin hjá Nessa.

### Dukkur í ketsjupp

Í Noreg er Nessa mest kendur fyri sínar óvanliga víðgongdu útsøgnir og átøk í stríðnum móti fosturtøku.



*- Ólavur Miðtún, farandi formaður í Pro Vita, tekur fult undir við øllum tí, Ludvig Nessa stendur fyri*



*- Frákoyrdi norski presturin Ludvig Nessa*

Um hetta er eitt tekin um, at Pro Vita eisini ætlar sær at herða sítt stríð móti fosturtøku, er ilt at siga, men farandi formaðurin í felagnum, Ólavur Miðtún, sigur seg taka fult undir við øllum tí, Ludvig Nessa stendur fyri.

Longu í 1991 var Nessa koyrdur frá sum prestur orskað av sínum tiltøkum í fosturtøkustríðnum. Hann var millum annað við til at senda brævbjálvar við smáum, uppkutaðum dukkum, ið vóru innsmurdar í ketsjupp, til norskar politikarar. Eisini gjørdi hann seg javnan inn á kvinnusjúkudeildir, har hann kravdi at fáa tey tiknu fostrini útflýggjaði. Tá hann ikki fekk tey, skipaði hann sjálvur fyri jarðarferðum við plastikkfostrum í evarska smáum kistum. Men hóast Nessa tvær ferðir hevur sitið í fongsli fyri síni tiltøk, tykist hann ikki at vera sinnaður at setast aftur í víðgongda stríðnum.

Á síni heimasíðu hevur Nessa inniliga heitt á fólk um at koma við nøvnum og upplýsingum, soleiðis at hann kann at skráseta allar læknar og onnur starvsfólk, sum eru við til at fremja fosturtøkur. Skrásetingin skal brúkast til at ávara fólk móti læknum, sum hava gjørt tað til sítt livibreyð at drepa børnini hjá øðrum, sigur Nessa.

Á somu heimasíðu, sum ikki er virkin longur, samanbar Nessa norskar læknar við nazistiskar bøðlar. Men sambært Nessa eru læknarnir verri, tí teir kunnu sjálvir velja. Ein av seinastu heilsanunum frá Nessa ljóðaði soleiðis: "Læknar eru ikki meir verdir enn eiit barn. Tað er tað ikki verri at skjóta ein lækna, enn at taka eitt barn úr móðurlívi."

Tá Nessa var koyrdur úr prestaembætinum, misti hann eisini rættin til "kraga og kjóla" og hevur tí ikki loyvi at prædika í norskum kirkjum. Tí stovnaði hann saman við øðrum frákoyrdum prestum meinigheitina Prestar í eksil. Meinigheitin er framvegis virkin, hóast norski kirkjumálaráðharrin hevur boðað frá, at hon er brot á kirkjulógina.

### Fosturtøka sum fyribyrging

Vit hava spurt Ólavur Miðtún í Pro Vita, hví felagið hevur valt at biðið Nessa koma til Føroyar.

Tað hava vit, tí vit meta, at hann er ein ógvuliga sakligur og seriøsur maður. Nessa varð koyrdur frá, tí hann meinar, at tað er skeivt at drepa børn. Og tað kunnu vit bara taka fult undir við.

*Men kann Pro Vita eisini taka undir við hansara harðrenda framferðarhátti?*

Eg haldi ikki framferðarhátturin er so harðrendur. Hetta hava verið symbolskar gerðir, sum vóru neyðugar, tí teir ikki sluppu framat í norsku fjølmiðlunum annars.

*Tú heldur tað ikki vera at tvassa í ólukkuligu støðuni hjá eini neyðars ungari gentu … ?*

Hetta eru ikki neyðars ungar gentur. Hetta eru sum oftast vaksnar konur, sum hava pengar, hús, mann og góðar umstøður annars at fáa børn.

*Og sum velja fosturtøku sum eina lætta loysn?*

Ja, sum var tað eitt slag av fyribyrgingarevni.

*Hvussu veist tú tað?*

Tí eg kenni kvinnur, sum hava fortalt mær tað.

*Men er tað ikki í so ógvusligt at kalla fólk, ið taka lut í fosturtøkum, fyri drápsmenn?*

Nei, tað haldi eg ikki, tí eitt menniskjalív er eitt menniskjalív. Eg kann bara svara uppá handan spurningin við at spyrja, hvat annað vit skulu kalla ein, sum drepir eitt annað menniskja.

*Er framferðarhátturin hjá Nessa nakað, Pro Vita ætlar at taka upp?*

So leingi, vit hava atgongd til fjølmiðlarnar, er tað ikki neyðugt. So tað fara tit og tíðin at vísa …

### Sóknarpresturin ábyrgdina

Tað var Niels Pauli Danielsen, sóknarprestur, sum stóð fyri og hevði ábyrgdina av gudstænastuni í Christianskirkjuni sunnukvøldið.

Spurdur, hví Christianskirkjan letur dyrnar upp fyri einum frákoyrdum og so víðgongdum presti, sigur Niels Pauli:

– Eg kann sjálvandi ikki taka ábyrgdina fyri øllum tí, sum Nessa annars er kendur fyri at gera og siga. So leingi tað, sum hann sigur her, heldur seg innan fyri tey mørk, kirkjan kann góðtaka, kann eg eisini taka mær ábyrgdina fyri tí.

– At Nessa er koyrdur frá í Noreg sigur kanska meir um valdsharrarnar, enn tað sigur um Nessa. Grundtvig fekk jú eisini forboð fyri at prædika, Kierkegaard fekk ongantíð nakað prestastarv, og sálmabólkin hjá Kingo bleiv í síni tíð bannað i kirkjuni. Slíkt hava vit jú ilt við at skilja í dag, sigur Niels Pauli Danielsen, sum eisini vísir á, at tríggjar tær størstu leikrørslurnar í Klaksvík, Emmaus, KFUM /K og Solo Deo Gloria, vóru við til at skipa fyri gudstænastuni sunnukvøldið.



*Í forhøllini fekst ymiskt upplýsandi tilfar um fosturtøku. Millum annað hesi plastikkfostrini í ymsum støddum*

## Koyrdu ov skjótt

**Sambært ferðkanningunum hjá løgregluni í Kaldbaksbotni leygardagin og sunnudagin, koyrdu tveir bilførarar ávikavist 116 og 122 kilometrar um tíman**

FERÐKANNINGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Bæði leygardagin og sunnudagin gjørdi løgreglan ferðkanningar í Kaldbaksbotni.

Leygardagin um middagsleitið varð ein bilur steðgaður, sum koyrdi 116 kilometrar um tíman, og sunnudagin um 13.30-tíðina varð ein annar bilur steðgaður, sum koyrdi 122 kilometar um tíman.

Løgreglan sigur, at báðir bilførararnir koma undir tað, sum rópt verður treytaða frákenning av koyrikortinum.

Hesir missa tó ikki koyrikortið á standandi fót, men noyðast sum frálíður upp til nýggja koyriroynd.

Løgreglan sigur, at eingin bilførari varð steðgaður leygardagin og sunnudagin við kenning.